# Sparingar og agn skulu geva javnvág

**Miðvís marknaðarføring er eitt lyklaorð í royndini hjá leiðsluni á Smyril Line at fáa javnvág í raksturin hjá felagnum. Aftur í fjør hevðir Smyril stórt hall, hóast hallið minkaði nógv samanborið við árið fyri**

SMYRIL LINE

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað skal egnast miðvíst eftir ferðafólki, samstundis sum kostnaðurin skal haldast niðri. Harafturat skal sølan umborð á Norrønu styrkjast við nýggjum og betri vørum, og prísirnir á ferðaseðlum skulu tillagast. Tað er lykilin hjá leiðsluni í Smyril Line til venda skeivu fíggjarligu gongdini hjá felagnum.


*Helst verður Tummas Magnussen nýggur nevndarformaður í Smyril Line*

Hósdagin hevði Smyril Line aðalfund, og har gjørdist greitt, at felagið aftur í fjør hevði stórt hall. Hallið var 24 milliónir krónur, og hóast tað er trivaligt, var tað munandi minni enn í 2003, tá ið reyða talið var 35 milliónir krónur.

### Tørv á pengum

Smyril Line hevur tørv á kapitali, og ársaðalfundurin gav leiðsluni heimild at hækka partapeningin við 120 milliónum krónum.

Stóru partaeigararnir, sum veittu Smyril Line ábyrgdarlán á 62,7 milliónir krónur fyrr í ár, kunnu umleggja lánið til partapening.

Fíggjarstøðan í felagnum hevur ikki verið tann besta seinasta árið. Vetrarmánaðirnar 2004 var hallið á rakstrinum so stórt, at inntøkurnar frá sumrinum ikki kundu fíggja hallið.

Fyri at eiga pengar til lán og rentur, seldi Smyril Line í fjør Hotel Føroyar, Vallarheið og skrivstovubygningarnar í Havn. Burtur úr hesari søluni fekk Smyril Line 29 milliónir krónur.

### Útskifting í nevndini

Á aðalfundinum var stór útskifting í nevndini hjá Smyril Line. Nevndarformaðurin Klæmint Weihe, Jens Kári Vilhelm og Morgan Goodlad bóru seg undan afturvali, og í teirra stað vóru valdir Edvard Heen fyri Tryggingarsambandið, Tummas Magnussen fyri Framtaksgrunnin og Sandy Cluness fyri Shetland Development Trust. Jónas Hallgrímsson heldur fram í nevndini.

# Europe váttaðir á G!



*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Flest øll hava vitað tað seinastu dagarnar, leysasøgurnar fóru at ganga fyrst í vikuni, og tosað varð fyri og ímóti. Men nú er tað váttað. Europe verða við á G!

Europe vóru í 80'árunum eitt av heimsins størstu rokknøvnum, tá The Final Countdown legði heimin fyri sínar føtur. Hetta lagið er enn í dag eitt hit, og er vorðin ein sannur rokkklassikari.

Eingin skandinaviskur rokkbólkur hevur megna at gjørt Europe eftir tá teir lóvu á fyrsta plássinum á hittlistunum í 26 londum í senn. Tá ártúsundini skiftu spældu Europe konsert mitt í Stockholm, har savnaðust 500.000 fólk!

Europe hava seinastu árini ferðast við upprunaligu manningini, Joey Tempest, John Norum, Ian Haugland, Mic Michaeli og John Levén. Konsertirnar hava fingið framúr ummæli. Europe ríða á alduni av 80'ára kendum rokkið, sum bólkar sum The Darkness hava endurføtt.

Konsertferðin heldur fram, og hevur júst verið í USA. Sambært fyrireikarunum eru Europe betri enn nakrantíð. Tendraðir og svangir, sum tá teir byrjaðu.

Skráin fyri G! er higartil: Nephew (DK),Darude (FIN), Hjálmar (ISL), Blue Foundation (DK/UK/JPN), Beats and Styles (FIN), Teitur Lassen Band, 200, Makrel, Týr, Martin Joensen, Stanley Samuelsen, Afenginn (DK/FIN/POL), DJ Slow (FIN), Sic, Gestir, Braquet, og onnur, pluss felagssangur, spælimenn, fólkatónleikur og annað.

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

## SPEKT søkir ungar grannskoðarar

Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar v.fl.

**Umsøkjarin**

Dentur verður lagdur á at umsøkjarin hevur royndir innan bókhald og hevur lokið HH prógv ella líknandi útbúgving.

Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi er fryntligur, fyrikomandi og til reiðar at arbeiða uttanfyri van-liga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

**Útbúgvingin**

Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum dagliga arbeiðið skulu okkara starvsfólk nema sær ástøðiliga útbúgving við at fylgja HD-undirvísingini á Føroya Handilsskúla.

Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

**Framtíðarmøguleikar**

Aftaná lokið HD-prógv er møguleiki fyri at halda áfram at nema sær ástøðiligu útbúgvingina cand.merc.aud., sum er neyðug fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

**Umsóknin**

Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 25. juni 2005.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 34 ella 54 34 45.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM85